# Fundarfrásøgn

Skúlastýrisfundur nr 3-2009/10, tann 12. november 2009, í Norðskála/Oyrar skúla frá kl 20.30 til kl 22.00.

Fundarluttakarar:

Foreldraumboð: Dávid Reinert Hansen, Nomi á Stongum,
Kommunustýrisumboð: Elsa Andreasen, Sigrid Christensen
Læraraumboð: Mirjam Zachariasen
Skúlaleiðarin: Sonni Djurhuus

Fundar skrá:

1. Opin mál:
   - Kunning frá arbeiðsbólki um framtíðar skúlamál í Sunda kommunu.
   Thordis Dahl Hansen er framsøgufólk:

   Byrja var í Sunda kommunu, at tosa um at broyta bygnaðin á skúlaøkinum. Arbeiðssetningurin var at gera eitt skúlasamstarv. Fysiski karmurin bleiv kannaður og næmingatalið bleiv eisini kannað, her sá man at ein stabilitetur var í talinum. Talið lá millum uml. 250 - 260 í miðal. framhaldsdeildin gevur uml. 98 næmingar. Samalagt gevur tað uml. 350 næmingar. Frá 1 - 9 flokk gevur tað ein tvísporaðan skúla. Út frá hesum er 3 dømi gjørd um, hvussu ein nýggjur skúli kann síggja út.
   Dømi eitt: 1 - 6 flokkur verður á Felagsskúlanum, 7 - 9 verður á Eiði. Kannað verður, um tað ikki kann gerast eitt breiðari samstarv um 10 flokkarnar í Eysturoynni.
   Dømi 2. er at 1- 3 er á Eiði og restin her á Oyrarbakka.
   Dømi 3. er at 1- 6 er á Eiði restin her á Oyrabakka.

   Fyrimunir:
   Allir næmingarnir eru javngamlir. Størri fakliga ekspertisu, næmingarnir læra hvønn annan at kenna frá fyrsta degi av. Øll fáa tað sama tilboðið. Næmingatalið verður støðugt. Størri vinaskari, tí fleiri eru av sama aldri.
   Serøkið fær ein sera stóran fyrimun. Tí tímarnir vera lagdir saman, og man kann veruliga gera nakað á hesum øki.
   Faklig ekspertisa. Lærarnir kunnu specialiserast í t.d innskúlingin, miðdeildini og framhaldsdeildini.

   Vansar:
   Koyringin, nú skulu øll flytast úr støðunum til eitt stað. Ein stórur skúli kann ikki flyta seg so skjótt sum ein lítil skúli. t.d ítróttardagar, tiltøk o.s.fr.
   Skúlin skal fáast uppá pláss fyrst, so verður tað arbeitt við frítíðarskúlanum aftaná.

   Dávur førir fram, at hvør skúli hevur sítt egna eyðkenni, summi hava kanska penari lit enn onnur. Hvussu tryggja vit okkum at vit varveita tey góðu tingini so ikki alt verður ein gráur massi. Her skal hyggjast eftir endamálsorðingini í fólkaskúlalógini og skapa virðini út frá tí.
   Mirjam førir fram um kommunan hevur hugsa um tørvin á lærarakreftunum, hvør heldur fram o.s.v.. Tørvur verður á uml. 25 lærarum. Tað verður eisini tvílæraraskipan og serligur tørvur kemur at fáa nógvar tímar. Koyringin er nakað sum

skapar órógv. Neyðugt er at skúlin byrjar tá næmingarnir fara í bussin.
Miðað verður ímóti, at stýrt verður við einari leiðslu. Tað verður eitt yvirskot av lærarakreftum. Spurningurin er hvussu disponera vit hesum yvirskoti. Skal tað fara til leiðslu ella t.d NSR.
Skúlastýrið heldur, at dømi eitt er besta loysnin.
Miðað verður ímóti at loysnin verður frá 1. august 2010. Kommunan ætlar, at gera sítt arbeiði liðugt áðrenn nýggjár.
Hvussu verður við nýggja skúlastýrinum ? Halda tey uppat ?

2.
3.
4.
5.
6.
7. -
8. -
9. -
10.